# TILTØK

**Gudstænastur**
**11. sunnudag e. Trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Heri Joensen. Kór við Leif Hansen luttekur
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Jens Fjendbo Jensen
***Sandavágur:*** kl. 11.00 Havstein Klein, stud. theol. og David Johannesen
***Norðskála:*** kl. 10.40 skriftamál, kl. 11.00 Messa, Emil Olsen
***Kollafjørður:*** kl. 11.00: Mogens Tilsted Christensen
***Skúlin í Skálafirði:*** kl. 11.00 Gudstænasta v/ John Myllhamar
***Gøta:*** kl. 11.00 altarg., Martin R. Jacobsen
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00 Niels Pauli Danielsen
***Klaksvíkar Sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30 Øssur Kjølbro
***Skálavík:*** kl. 12.00 Bjarni Bæk
***Hvalba:*** kl. 12.30 Ólavur Rasmussen
***Sumba:*** kl. 12.00 Patrick de Neergaard, dópur og altargongd
***Fámjin:*** kl. 12.00 altarg., Jónsvein Bech

**Hebron á Argjum**
Sunnudagin kl. 10.30 verður Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum luttaka Anna og David Rodda, trúboðarar í Senegal.
www.hebron.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti, breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00 Landsbøn.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen, aftaná kaffisteðgin er Summarskúlin fyri børn, kl. 22.00 Útimøti á Vaglinum. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. www.filadelfia.fo

**Frá Ebenezer**
Leygardagur kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagur kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 18.00 Evangel. møti, talari Pól Guttesen.
www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Sunnudagin kl. 11.00 Guðstænasta v/ Jákup Hendrik Hansen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Martin Thomsen.

**Meinigheitshúsið í Tórshavn**
Sunnudagin kl. 18.00. Ytrimissiónsmøti v/ Maureen og Kaju.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnudags- og týskvøldsmøtini byrja aftur 14. august.
www.livdin.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa og barnadópur v/ Christian Noval, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
www.katolsk.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti, Andrias Samuelsen talar.
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
www.gospel.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18.00 møti v/ Leivur Nattestad.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Paula Høj. Barnaansing. Hjartaliga vælkomin.

**Kvívík**
Heimamissiónin hevur útimøti í Kvívík sunnukvøldið kl. 20.00.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 18 Møti, Gunnar Reynslág, Argir, talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við teimum ungu av Skála. Innsavnan til húsið, aftaná møti verður drekka. Øll eru vælkomin.

**Skúlin í Lamba**
Sunnudagin kl. 16 møti v/ John S. Myllhamar. Innsavning til heidningamissiónina.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara. Innsavning til missiónsarbeiðið.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Hjørdis H. Petersen.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Ólavi Jacobsen.
www.keldan.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøtið verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnkvøldið kl. 18 verður møti, har sandingar taka lut við sangi og talu. Innsavnan til Thabor.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið kl. 19.00 Møti við Marius Jacobsen. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Torfinn Hansen, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Fríðleif Lydersen, Skálavík. Ymiskar sangkreftir.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Karl Kenning og Ednu Bech. Bønarmøti 1/2 t. áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Josvein Hovgaard.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 við Nimrod og Mourits. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Frá 8. august-26. august er Tilhaldið opið kl. 15.00-17.00***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Felagið Tórshavn skipar fyri gongutúri mikudagin 10. august kl. 18.00. Gingið verður til Brynjumannaborð-Stórareyn og Skælings bygd, farið verður av Kunningarstovuni í Havn. Tilmelding neyðug.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
**er í summarfrí frá 1. juli til 5. september 2005.** Tá verður spælistovan í Margarinfabrikkini.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Kvinnufundur kl. 20–21.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

## Brúdleyp

Í dag, 6. august giftast Katrin Dagbjartsdóttir Johansen, Havn og Mats Brisenfeldt, Stockholm. Vígslan verður í Ráðhúsinum í Malmø. Adr.: Mäster Johan Hotel, Mäster Johansgatan 13, 211 21 Malmö, tlf. +46 406646400 og Fax +46 406646401.

Í dag, 6. august kl. 14.00 giftast í Sjóvar kirkju Anna Elisa Jógvansdóttir, Innan Glyvur og Jimmi Højrup Jepsen, Esbjerg. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00.

Í dag, 6. august kl. 16.00 giftast í Oyndarfjarðar kirkju Meibritt Jacobsen, Leirvík og Hans Berg Juul, Oyndarfjørður. Veitslan verður fyri innbodnum á Casablanka, Saltangará, kl. 19.00.

Í dag, 6. august kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Elinborg Mortensen og Niklas Samuelsen. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Í dag, 6. august kl. 11.00 giftast í Vor Frelser kirke, Nuuk, Marie Magnussen og Frederik Lundblad. Brúðleypsadressan er Pilutaq, 3900 Nuuk, Grønland.

Í dag, 6. august giftast í heiminum í Skopun Kathrina í Byrgi og Símun Martin Nicolajsen. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Samljóð í Skopun kl. 19.30.

Í dag, 6. august giftast í Sædding kirkju Tina Skipper Rasmussen, Esbjerg og Karstin Knudsen, ættaður av Skála. Adr.: Kunstpavillonen í Esbjerg.

Í dag, 6. august kl. 15.00 giftast í Kegnæs kirkju Hansa M. Petersen, ættað av Skipanesi og Thorbjørn Thade Petersen, ættaður úr Ribe. Brúdleypsadr.: Skoven 9, 6470 Sydals, Kegnæs.

Í dag, 6. august giftast í Godthåb kirkju, Godthåb, Svenstrup, Helen Houmøller og Jens Rasmussen úr Kollafirði. Adressan er Kildevej 10, Godthåb, DK 9230 Svenstrup.

Í dag, 6. august kl. 14.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Malla Dam og Søren Hjarbæk Jensen. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í Ítróttarhøllini í Trongisvági.

Í dag, 6. august kl. 11.00 giftast í Berøa, Saltangará, Linda Jacobsen, Vatnsoyrar og Janus Kannuberg, Runavík. Høvi verður at heilsa uppá brúðarparið í Berøa millum kl. 13.00 og 17.00.

Leygardagin 3. september kl. 14.30 giftast í Vágs kirkju Vima Beck, Lopra og Bjarti Nattestad, Hvalba. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 373972, 504530, 375067 ella 314543 innan 14. august.

Leygardagin 17. september kl. 12.30 giftast í Kelduni í Skálafirði Oda Sonja Frederiksberg, Strendur og Signar Martin Høj, Strendur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 448328 ella 448327 innan 1. september.

Leygardagin 24. september kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Anita Jarlesdóttir Arntsen úr Mikladali og Petur Juul Suni Jaocbsen av Syðradali K. Døgurði verður í Skálanum fyri innbodnum kl. 17.30. Vælkomst verður eftir kl. 22.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga okkum frá innan 24. august á tlf. 458625, 274118 ella 258625.

**Silvurbrúdleyp**
Í dag, 6. august hava Eileen Kirke og Fróði Poulsen úr Havn verið gift í 25 ár. Tey búgva: Storegade 122, DK-6700 Esbjerg.

9. august hava Jonhild og Jens Johannesen, silvurbrúdleyp.

Týsdagin 9. august hava Sanna og Bjørn Akselsen, Sandavágur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 6. august. Opið hús verður í meinigheitshúsinum í Sandavági frá kl. 15.00 til 21.00.

## 70 ár
Í dag, 6. august verður Zacharias Zachariassen, Norðragøta, 70 ár. Dagurin verður hildin í Filadelfia í Gøtu, leygarkvøldið tann 6. august kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 80 ár
Í dag, 6. august verður Andrea á Dul, Tórshavn, 80 ár. Dagurin verður hildin í Pálsstovu sunnudagin 7. august kl. 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 85 ár
Sunnudagin 7. august verður Simona Nysted, Vágur, 85 ár. Dagurin verður hildin á Suðuroyar Ellis- og røktarheimi frá kl. 14.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.